# Reglur

## um nýtslu av hjálparmiðlum o. ø. til fráfaringarroyndir fólkaskúlans

(Til bý-/bygdaráð, skúlanevndir, fólkaskúlaleiðarar, lærararáð, aðrar skúlar, undirvísingarstovnar o.o.).

Sambært § 10, 1. stk. í Kunngerð frá 16. juli 1993 um fráfaringarroyndir fólkaskúlans hevur Landsskúlafyrisitingin gjørt hesar reglur um loyvdar hjálparmiðlar o.a.:

**§ 1. Kristnikunnleiki**
Í fyrireikingartíðini er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 2. Føroyskt**
Til tær skrivligu royndirnar er loyvt at nýta orðabøkur.
2. stk. Í fyrireikingartíðini til tær munnligu royndirnar í ókendum teksti er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í dagligu undirvísingini. Upprit, sum næmingurin hevur gjørt í skúla- og fyrireikingartíðini, kunnu verða tikin við til royndirnar. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.
3. stk. Til tær munnligu royndirnar í kendum teksti er eingin fyrireikingartíð. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir.

**§ 3. Danskt**
Til tær skrivligu royndirnar er loyvt at nýta orðabøkur.
2. stk. Í fyrireikingartíðini til tær munnligu royndirnar í ókendum teksti er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í dagligu undirvísingini. Upprit, sum næmingurin hevur gjørt í skúla- og fyrireikingartíðini, kunnu verða tikin við til royndirnar. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

3. stk. Til tær munnligu royndirnar í kendum teksti er eingin fyrireikingartíð. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir.

**§ 4. Enskt**
Til tann skrivliga partin av víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans er loyvt at nýta orðabøkur og mállærulig yvirlit, sum næmingurin møguliga sjálvur hevur gjørt.
2. stk. Í fyrireikingartíðini til tær munnligu royndirnar í ókendum teksti er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í dagligu undirvísingini. Upprit, sum næmingurin hevur gjørt í skúla- og fyrireikingartíðini, kunnu verða tikin við til royndirnar. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.
3. stk. Til tær munnligu royndirnar í kendum teksti er eingin fyrireikingartíð. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir.

**§ 5. Týskt**
Í fyrireikingartíðini til tær munnligu royndirnar í ókendum teksti er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í dagligu undirvísingini. Upprit, sum næmingurin hevur gjørt í skúla- og fyrireikingartíðini, kunnu verða tikin við til royndirnar. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.
2. stk. Til tær munnligu royndirnar í kendum teksti er eingin fyrireikingartíð. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir.

**§ 6. Rokning/støddfrøði**
Til fráfaringarroynd fólkaskúlans í fimisrokning er loyvt at nýta hesar hjálparmiðlar: passara, strikusneis, vinkulmálara, kolpappír, kladdupappír o.a. Tað er ikki loyvt at nýta lummaroknara.
2. stk. Til fráfaringarroynd fólkaskúlans í greiðslurokning og í skrivligari rokning/støddfrøði til víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans er loyvt at nýta: roknitalvur, formlasavn, passara, strikusneis, vinkulmálara og

kolpappír. Loyvt er somuleiðis at nýta lummaroknara, men ikki aðrar hjálparmiðlar av dátutøkniligum slag. Boðað verður skúlunum frá í hvørjum einstøkum føri, um serstakir hjálparmiðlar kunnu verða nýttir til einstakar uppgávupartar.
3. stk. Í fyrireikingartíðini og til royndina í munnligari rokning/støddfrøði til víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans er loyvt at nýta allar hjálparmiðlar sum lærubøkur, upprit, roknitalvur, formlasavn, teknmyndalista o.a., sum hava verið nýtt í dagligu undirvísingini. Harumframt er loyvt at nýta m.a. lummaroknara, hóskandi dátutøkniligan útbúnað, passara, strikusneis, vinkulmálara, kolpappír og ítøkiligt tilfar, myndlar og tílíkt, sum er viðkomandi fyri ta einstøku uppgávuna.
4. stk. Lummaroknarar skulu einki forrit hava í sær, áðrenn royndirnar byrja, og teir skulu heldur ikki hava prentara.
5. stk. Teir hjálparmiðlar, sum umrøddir eru í 2. og 3. stk., eiga at vera teir somu, sum hava verið nýttir í dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 7. Alis-/evnafrøði, alisfrøði og evnafrøði**
Í royndarhátti A kann næmingurin hava við sær alis-/evnafrøðiligar talvur og egin upprit bæði til fráfaringarroynd og víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans.
2. stk. Í royndarhátti B kann næmingurin hava við sær allar hjálparmiðlar: lærubøkur, upprit, alis-/evnafrøðiligar talvur, lummaroknara o.a., sum hevur verið nýtt í dagligu undirvísingini.
3. stk. Í báðum royndarháttum ansar skúlin eftir, at tilfar, útbúnaður og tól, sum viðvíkja tí einstøku royndaruppgávuni, eru til taks.

**§ 8. Roknskaparførsla**
Til fráfaringarroynd fólkaskúlans kann næmingurin nýta tann útbúnað og tey tól, sum hava verið nýtt í dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 9. Maskinskriving**
Til fráfaringarroynd fólkaskúlans kann næmingurin nýta tann útbúnað og tey tól, sum hava verið nýtt í dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 10. Søga/samtíð**
Í fyrireikingartíðini er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í tí dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 11. Landalæra**
Í fyrireikingartíðini er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í tí dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 12. Lívfrøði**
Í fyrireikingartíðini er loyvt at nýta teir somu hjálparmiðlar, sum hava verið nýttir í tí dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 13. Handarbeiði, smíð og heimkunnleiki**
Til fyrireikingina og royndina er loyvt at nýta upprit og allar hjálparmiðlar, sum hava verið nýtt í dagligu undirvísingini. Skúlin ansar eftir, at loyvdir hjálparmiðlar eru til taks.

**§ 14.** Hesar reglur eru galdandi frá 1. august 1993.

Landsskúlafyrisitingin, 1. juni 1993.

Hensar Ellingsgaard (sign.)

/ P.J.Sigvardsen (sign.)